# Tarvalortakapping

hjá 9.a í Venjingarskúlanum sum skuldi vera 9.mars

## 23. mars kl. 10.00

Kaffi og okkurt afturvið verður til keyps


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 600, Sp/f Hallberg, 600 Saltangará.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Katrin Elinborg Miðberg, 600 Saltangará (formaður), Poul Hallgrím Miðberg, 600 Saltangará, Paul Miðberg, 600 Saltangará og Joan Miðberg, 600 Saltangará.
Innkomin í nevndina: Rodmundur Nielsen, Sýnarvegur, 625 Glyvrar (formaður), Sofus Terji Hansen, Leitisvegur, 626 Glyvrar, Eyð Brestisdóttir Nielsen, Sýnarvegur, 625 Glyvrar og Sigbjørg Hansen, Leitisvegur, 625 Glyvrar
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Poul Hallgrím Miðberg, 600 Saltangará.
Innkomin sum stjóri: Sofus Terji Hansen, Leitisvegur, 625 Glyvrar.

Skráseting Føroya tann 21. mars 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

A. Navn: P/F Vestmanna Timburhandil (P/F-nr. 162), 350 Vestmanna.

Og

B. Navn: Sp/f Joensen & Hansen (Sp/f-nr. 3286), 350 Vestmanna.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

Skráseting Føroya tann 21. mars 2002

Kristin Balle


Lesið Sosialin



## Sethús til sølu

Um hóskandi boð fæst, selji eg sethús míni á Toftum, sum eru bygd í 1980.

Húsini eru stór og rúmlig og liggja væl við vegin í barnavinarligum umhvørvi.

Hetta eru 1-plans hús við lofti yvir norðasta partinum, sum er bygdur uppí fyri 4 árum síðan. Betongveggur er millum hendan partin og sethúsini annars, og er norðasti parturin tískil væl egnaður til íbúð við lofti.

Húsini eru 160 fermetrar til støddar, umframt loftið, sum er umleið 30 fermetrar.

**Í húsinum er:** Køkur, grovkøkur, stova, 3 kømur umframt hjúnarrúm, bað við wc og eitt minni wc.

Í norðasta partinum, har handil er, er skilaveggur og trappa uppá loftið.

Húsini kunnu síggjast eftir avtalu.

**Vilmund Jacobsen**
Tlf. 225429



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Mentunarstuðul
### frá mentunarnevnd Tórshavnar býráðs

2 ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentunarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 15.apríl 2002. Merk umsóknina "Mentunarstuðul".

SNARSKIVAN





TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Hallarvørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir hallarvørði til Hoyvíkshøllina/Hoyvíkar skúla.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at røkja høllina og økið uttanum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum
- at halda reint og ruddiligt inni og uttanum høllina
- at hava umsjón við og samskipa reingerðina í høllini

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava handverkaraútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

Hevur tú ikki skeið í skipaðum viðlíkahaldi av bygningum, skipar kommunan fyri hesum skeiði.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petur Dahl, skúlastjóra, tlf. 315073 ella Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 315160.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. apríl 2002. Viðmerkið umsóknina: Hallarvørður.

SNARSKIVAN



ALMANNA- OG HEILSURØKTARFELAGIÐ
J. Paturssonargøta 24 • Postboks 350 • 110 Tórshavn
Tlf. 315670 • Fax 315727 • e-mail: ahf@post.olivant.fo

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í hølum FØROYA ARBEIÐARAFELAGS, Tjarnadeild 5, 100 Tórshavn

**Týsdagin 23. apríl 2002 kl. 10.00**

**Fundarskrá:**
1. Nevndarfrágreiðing fyri farna árið
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi
3. Val av nevnd og tiltakslimum
4. Val av grannskoðara
5. Innkomin uppskot
6. Ymiskt

**Nevndin**



## Vøruvognur til sølu

Toyota HIACE Diesel, árg. des. 1999, km. 40.000.

Vøruvognurin er MVG-skrásettur

**Tlf. 219512**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3335
Navn: Sp/f Skúlakoyring v/ Niels Peter Olsen
Adressa: Sleipnisgøta 16, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 15.03.2002
Viðtøkudato: 15.03.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Niels Peter Olsen, Sleipnisgøta 16, 100 Tórshavn.
Stjórn: Niels Peter Olsen, Sleipnisgøta 16, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 15.03.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka Koyriskúla o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 21. mars 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2462, P/F Mark, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Erling Georg Eysturoy, á Fløtti 3, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Heini Eysturoy, Vesturgøta 1, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Heini Eysturoy, Vesturgøta 1, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Erling Georg Eysturoy, á Fløtti 3, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 21. mars 2002

Kristin Balle


VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Kunngerð um summarferiu 2002

Byggivinnan heldur summarferiu vikurnar 30, 31 og 32, tað er frá mánadegi 22. juli til leygardagin 10. august.

**Vinnuhúsið**
***og fyritøkurnar:***

P/F Articon
P/F BSV
P/F Demich
P/F Elmek
P/F Føroya Gluggi
P/F Guttesen & Staksberg
J & K Betong
Klaksvíkar Byggivirki
P/F Løvubetong
P/F Zacharias Leitisstein
P/F Atlanticpane
P/F Byggitek
P/F Einar Mikkelsen
Sp/f El & Tele
P/F Føroya Termovirki
Sp/f Haldur Vang
P/F J & K Petersen
P/F LM – Electric
P/F Vatnsoyra Snikkaravirki

Vinnuhúsið • Boks 1038 • R. C. Effersøesgøta 30 • FO–110 Tórshavn
Tlf. +298 311864 • Fax +298 317278 • e-mail: industry@industry.fo



**Sjúkrasystraskúli Føroya**
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrasystralærarar

Størv sum sjúkrasystralærarar eru leys til setan 1. mai ella eftir avtalu. Talan er um starv, sum fastsettur lærari og starv, sum vikarur fyribils til 28. februar 2003.

**Høvuðsuppgávurnar hjá læraranum fevna um:**
- Undirvísing í sjúkrarøkt
- Vegleiðing í samband við uppgávuskriving og verkætlanir
- Saman við undirvísarunum á skúlanum leggja frálæruna tilrættis
- Arbeitt verður í stóran mun í toymi

**Førleikakrøv:**
- Sjúkrasystir við viðkomandi framhaldslestri á kandidat ella masterstøði
- Kunnleika til sjúkrasystraútbúgvingina og royndir innan undirvísing
- Sjúkrasystir, sum er í gongd við hægri lestur, kann eisini søkja

Sjúkrasystraskúli Føroya tekur 20 lesandi inn um árið.

Á skúlanum verður støðugt arbeitt við at menna sjúkrasystraútbúgvingina. Í samband við at sjúkrasystraútbúgvingin verður umløgd, henda stórar broytingar á skúlanum. Sum lærari á skúlanum fært tú møguleika at luttaka í og ávirka broytingarnar.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rektaran tlf. 316027 lokal 436.

Umsókn við CV og prógvum skal sendast til:

**Sjúkrasystraskúla Føroya**
**Att.: Rektarin**
**Eirargarður 14 B**
**FO-110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2002.


www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo